## Leiðari til Barnagarðin á Svangaskarði.

Nes kommuna søkir eftir leiðara 40 tímar um vikuna til Barnagarðin á Svangaskarði, at byrja **15. apríl 2008** ella eftir nærri avtalu.

Barnagarðurin er ætlaður 55 børnum, hevur tvær stovur, Sóldøgg og Sólareyga, har børnini hava sítt tilknýti.

Ein verkstað, Sólarglottin, har børnini gera ymiskt ítriv. Hvønn dag eru 7 børn úr hvørji stovu á verkstaðnum.

Vit arbeiða við "Trin for trin".

Barnagarðurin liggur við stadionøkið á Svangaskarði, tætt við náttúruna og við nógvum møguleikum at vera úti.

**Vit bjóða**

- eitt áhugavert starv í einum nærumhvørvið, har náttúran hevur stóran leiklut í gerandisdegnum, og har spælið fyllir nógv
- møguleika at seta dám á stovnin
- møguleika fyri ráðgeving og eftirútbúgving

**Vit vænta at tú**

- er útbúgvin pedagogur
- kanst arbeiða sjálvstøðugt og taka avgerðir
- hevur hugsjónir um virksemi á einum barnagarði
- hevur hug og áræði at skapa ein fjølbroyttan og tryggan gerandisdag við virðing og umsorgan fyri tí einstaka barninum, foreldrunum og starvsfeløgunum
- kanst virka í góðum samstarvi við starvsfelagar og foreldur
- dugir væl at samskifta, bæði innan- og uttanhýsis
- hevur evni og áræði at ganga nýggjar leiðir og sær møguleikar fram um vansar
- hevur teldukunnleika á brúkarastøði

**Setanarviðurskifti**
Løn sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya.

Meiri fæst at vita um starvið við at venda sær til Nes kommunu, borgarstjóran tlf. 565000

Umsókn saman við viðmælum, upplýsingum um útbúgving og royndir skal vera Nes kommunu postboks 43 Toftavegur 3, 650 Toftir í hendi í seinasta lagi **mánadagin 7. apríl 2008.**

**NES KOMMUNA**
nes@nes.fo • www.nes.fo

mbf

## MBF aðalfundurin 2008

Lýst verður til aðalfundar,
**mikudagin 7. mai kl. 19.00** í MBF húsinum.

Í samband við aðalfundin heldur Kathrina L. Joensen, cand. pæd. psyk. og sjúkrarøktarfrøðingur, fyrilestur um:

**" At koma fyri seg sálarliga aftaná broytt lívskor"**

Aðalfundarskráin verður smb. viðtøkum felagsins.

Uppskot frá limafeløgunum til mál at leggja fyri aðalfundin, og uppskot til formann og starvsnevndarlimir fyri Sálarliga/neurologiska bólkin og Medisinska bólkin, skulu verða starvsnevndini í hendi 3 vikur áðrenn aðalfundin.

**Seinasta freist at lata inn uppskot er 16. apríl 2008.**

Allir limir í limafeløgunum hjá MBF kunnu møta á aðalfundinum.

**Starvsnevndin**

## BRÚÐARKOYRING



Skalt tú hava eina serliga uppliving, so er at leiga ein bil hjá Havnar Bilasavni frá Sp/F Bilrøkt í Havn. Vel t. d. ein svartan Ford A frá 1930, ein hvítan Chevrolet frá 1931, ein bláan Chevrolet Skyline frá 1952 ella ein brúnan Jaguar frá 1978

**Ring til Bilrøkt á 588880**
www.bilrokt.fo bilrokt@bilrokt.fo

# KUNNGERÐ

**um framløgu av broytingaruppskoti í býarskipan og byggisamtykt fyri Leirvíkar Kommunu.**

Við heimild í løgtingslóg nr. 13 frá 21. mai 1954 við seinri broytingum hevur kommunustýrið á bygdarráðsfundi tann 3. mars 2008 samtykt, at gera broyting í býarskipanini og byggisamtyktini fyri Leirvíkar Kommunu.

Broytingin er løgd fram til almenna eftirskoðan í vanligu upplatingartíðum frá 4. mars til 28. mars 2008.

**Broytingin fevnir um:**
Økið ið er millum Brúsá og Garðsveg, og millum Bygdarhúsið og friðaða økið við Garð. Økið verður broytt til Almen endamál E .

Møgulig mótmæli og/ella broytingaruppskot skulu skrivliga verða kommunuskrivstovuni í hendi í seinasta lagi 5. juni 2008.

LEIRVÍKAR KOMMUNA

**Leirvíkar Kommuna**
4. mars 2008




> Telefonráðgeving > Anonymitet
> Tagnarskyldu > Stundir at lurta

Blái Krossur
www.blakross.fo

